

# Posta Stamps Føroyar

## Nr. 21

September 2014

ISSN 1603-0036

Postkort úr Kina?

Frímerkið vunnið heiður

Jólavørur 2014

Posta
FAROE ISLANDS




# Postkort úr Kina?

## Kundi tú hugsað tær at fingið postkort úr Mikronesia, Bermuda ella kanska Hawaii? Melda teg so til á postcrossing.com.

Eitt, sum hevur tikið seg upp kring heimin í seinastuni er "postcrossing". Í hesum talgildu tíðum sakna fólk at fáa annað enn rokningar og lýsingarbløð í postkassan. Nú tosa vit ikki um talgilda postkassan, men tann sum vanliga hongur uttanfyri.

Hetta vildi Paulo Magalhaes úr Portugal gera nakað við og fyri nøkrum árum síðan byrjaði hann eina verkætlan. Hann ynskti at sameina fólk úr øllum heiminum uttan mun til hvar tey búðu og um tey høvdu felags áhugamál.

Paulo stovnaði postcrossing.com - eina heimasíðu har ein kann skráseta seg og senda postkort til tilvildarlig fólk kring heimin og eisini fáa postkort frá tilvildarligum fólkum úr øllum heiminum. Hetta er ein stuttligur háttur at savna postkort uppá og eisini frímerki, um áhugi er fyri tí.

Tað snýr seg um at koma hvørjum øðrum við, at geva øðrum innlit í ein lítlan part av tínum lívi, at taka sær eina lítla løtu og skriva um júst tað, tú hevur hug til. Summi skriva um teirra vakra land, onnur yrkingar og uppaftur onnur fortelja um teirra gerandisdag. Summi dáma at gera nógv burturúr við at velja eitt vakurt postkort og eitt frímerki, sum passar til.

At postcrossing er sera vælumtókt úti í heimi sæst m.a. á Guernsey, í Finnlandi og í Hvítarusslandi, har tey hava givið serlig “postcrossing frímerki” út.




Enn eru ikki nógvir limir úr Føroyum við. Føroyar eru lítlar og fjarskotnar og tí er eftirspurningurin eftir postkortum úr Føroyum sera stórur. Limir í Føroyum fáa ofta áheitanir um at býta um postkort uttanum vanligu skipanina, har tú fært eina tilvildarliga adressu útflýggjaða.

Upprunaliga verkætlanin hjá Paulo gjørdist størri enn hann nakrantíð hevði væntað. Í dag eru meira enn 25 milliónir postkort send umvegis postcrossing skipanina og limatalið liggur um 500.000. Limir úr 218 londum eru skrásettir í skipanini.

**Hvussu virkar hetta?**

Mannagongdin er í stuttum tann at tú fyrst skal skráseta teg á www.postcrossing.com við at upplýsa navn og adressu.

- Bið heimasíðuna um eina adressu
- Send eitt postkort til adressuna
- Bíða til tú fært eitt postkort
- Skráset postkortið, sum tú hevur fingið, á heimasíðuni

Fyrsta stigið er at biðja um adressuna hjá einum øðrum brúkara, sum tú skal senda eitt postkort til. Tú fært síðan ein teldupost við adressu og skrásetingarnummar (sum td. FO-123).

Skrásetingarnummarið skal skrivast týðiliga á postkortið, so móttakarin kann skráseta títt postkort á postcrossing.com. Tín adressa verður so latin tí næsta, sum biðjur um eina adressu at senda postkort til.

Til ber at senda upp til 5 postkort í senn. Hvørja ferð eitt av tínum kortum verður skrásett, kanst tú biðja um eina nýggja adressu at senda postkort til.

Vitjað www.postcrossing.com og fá meira at vita um hetta áhugaverda átak.






# Nýgg SEPAC mappa

Vit fegnast um at felags SEPAC mappan nú fæst til keyps. Hetta er fimta mappan í røðini ”Beautiful Corners of Europe” og er evnið hesa ferð ”Blómur”.

Í mappuni eru frímerki av blómum úr teimum 14 SEPAC- londunum, sum eru: Áland, Føroyar, Gibraltar, Grønland, Guernsey, Ísland, Isle of Man, Jersey, Liechtenstein, Luxembourg, Malta, Monaco, San Marino og Vatikanið.

Føroyska SEPAC frímerkið kom út í februar 2014 og myndar ta einastu upprunaligu føroysku rósuna: Mjúk rósa *(Rosa mollis)*. Marita Gulklett hevur tikið myndina.

SEPAC stendur fyri **Small European Postal Administrations Cooperation** og eru í løtuni 14 postverk limir í Sepac-bólkinum. Bólkurin hevur áður givið út fýra felags frímerkjaútgávur við evninum landslag og felags heitinum ”Beautiful Corners of Europe”.

Endamálið við Sepac-frímerkjunum er at seta fokus á tað felags samstarv millum postverkini, ið eru limir í Sepac, bæði mótvegis alheims filatelistbransjuni og frímerkjasavnarum til frama fyri filateli. Endamálið er eisini at gera fólk varug við søguna, náttúruna, landslagið og mentanina í SEPAC limalondunum.




# Frímerkið vunnið heiður

Posta fegnast um at enn ein føroysk frímerkjaútgáva er heiðrað uttanlands.

"Asiago – Premio Internazionale d'Arte Filatelica" hevur í ár heiðrað føroyska frímerkjaarkið "Føroyski báturin" við "The Olympic Academy Prize for Culture".

Edward Fuglø hevur teknað smáarkið, sum vísir føroyska bátin og lutir umborð. Svenskarin Martin Mörck hevur graverað. Smáarkið varð givið út 25. februar 2013.

Brot úr úrskurðinum hjá dómsnevndini:

*"Frá fornari tíð hava menniskju í hesum heimi brúkt síni evni og hugflog at geva teimum lutum, teimum tørvaði, tað skap og tann eginleika, ið var fyri neyðini.*

*Handverkarar og bøndur hava lagt lunnar undir øll stór mentanarsamfeløg. Framvegis í dag - eftir fleiri enn túsund ár - eru handverkarar og bøndur til staðar í gerandisdegnum við virksemi, sum samfelagið ikki fær verið fyri uttan."*

Frá vinstru: jólaprýði, jólakort, jólamerkini, ársmappa og árbók 2014







# Jólavørur 2014

## Jólaprýði

Jólaprýðið, sum mynda føroyskar kirkjur, er sera vælumtókt, og aftur í ár fáast tríggjar føroyskar kirkjur sum jólaprýði. Eins og undanfarnu ár hevur Janus Guttesen staðið fyri sniðgevingini.

Í ár mynda jólaprýðini kirkjurnar í Hoyvík, á Sandi og í Haldarsvík.

Jólaprýðið er úr messingi og lagt við gulli. Gyltur snórur er festur í prýðið, so klárt er at heingja upp. Tey eru uml. 8,5 cm til støddar, og verða seld í vakrari eskju - trý  í hvørjari.

Jólaprýðið kostar 95,00 kr. settið, íroknað mvg.

## Jólakort

Í sambandi við jólaútgávuna gevur Posta eisini út trý vøkur jólakort við myndevnum úr jólamerkjaarkinum.

Jólakortini eru dupult og verða tey seld sum sett saman við bjálvum.

Jólakortini kosta 25,00 kr. settið.

## Jólamerki

Í ár mynda jólamerkini jólamenninar Greyta-sleik og Kertustubba, sum hvørt mansbarn í Føroyum man kenna frá Barnaútvarpinum. Edward Fuglø hevur teknað jólamerkini, har vit síggja jólamennirnar stákast til jóla, garta og stuttleika sær í kavanum.






Avlopið av jólamerkjasøluni fer til Jólamerkjagrunnin, ið hevur til endamáls at stuðla tiltøkum fyri børn og ung í Føroyum.

Jólamerkjaarkið kostar 30,00 kr.

## Ársmappa

Ársmappan verður givin út í november. Hon er 235 x 202 mm til støddar, og í henni eru øll frímerkini og smáørkini, ið eru givin út í ár. Hefti og postgjaldsmerki eru ikki við í ársmappuni, sum verður seld fyri áljóðandi virði.

Ársmappan kostar 342,50 kr.

## Árbók

Enn sum áður, so lýsir árbókin við greinum og vøkrum myndum allar ársins frímerkjaútgávur. Øll frímerki og smáørk eru sett í lummar í árbókini, sum er 240 x 220 mm til støddar.

Tekstirnir í snøggu árbókini eru á trimum málum: donskum, týskum og enskum.

Postgjaldsmerki og hefti eru ikki við í bókini.

Árbókin kostar 398,00 kr.

*Eitt gott jólagávuhugskot!*

# Nýggjar útgávur - november 2014




Nýggj útgáva: **Árbók 2014**
Útgávudagur: 03.11.2014
Virði: 398,00 kr.




Nýggj útgáva: **Ársmappa 2014**
Útgávudagur: 03.11.2014
Virði: 342,50 kr.



Nýggj útgáva: **Jólamerki 2014**
Útgávudagur: 03.11.2014
Sniðgevi: Edward Fuglø
Virði: 30,00 kr.

Framsíðumynd: Hoyvíkar kirkja - Mynd: Ólavur Frederksen
Snið og uppsetan: Posta Stamps - Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

Find us on Facebook